Fagnarðardagur á Selatrað

2. Hvítusunnudag kl. 13⁰⁰ – 17⁰⁰

Unnið tykkum ein góðan dag á Skótadeplinum á Selatrað – við allari familjuni.

2. Hvítusunnudag verður møguleiki hjá øllum familjum og øðrum áhugaðum at koma á Skótadepilin, tí henda dagin fara skótabólkarnir kring landið at skipa fyri nógvum ymiskum tiltøkum.

Hetta vikuskiftið er eisini LPK, sum er landspatrúljukappingin hjá KFUM-skótunum, so tit fáa eisini møguleikan at vera hjástødd, tá ið vinnandi patrúljan verður heiðrað.

Báta-samband

Úr Hósvík:	Av Selatrað:
kl. 12.00	kl. 14.30
kl. 13.00	kl. 15.30
kl. 14.00	kl. 16.30
kl. 15.00	kl. 17.30
kl. 16.00	

Nógv tiltøk á skránni. Byrjað verður kl. 13⁰⁰

- fiskibrunnur
- rør-skrei ibreyt
- matsøla og café
- virknistjald
- forðarenning
- styvlakast
- primitiv matgerð
- skjótibreyt
- svampakast
- pílakast
- poppkorn á báli
- klintriveggur
- 21-spæl
- kondi-bingo
- tombola
- lutaseðlar *við góðum vinningum*

Vælkomin at vitja okkum á Skótadeplinum á Selatrað 2. Hvítusunnudag

KFUM-SKÓTARNIR Í FØROYUM

– ein virkin barna- og ungdómsfelagsskapur

www.scout.fo

TEGNS • 26800

HD - 1. partur í Føroyum

Treytað av nóg stórari luttøku verður í heyst aftur farið undir HD 1. part.
HD 1. partur er ein grundleggjandi ástøðilig innføring í lærugreinirnar vinnubúskap, samfelagsbúskap, hagfrøði, vinnulívsrætt og EDV og búskap.
Fortreyt:
Hægri handilskúla-, Students-, HF- og HT-prógv ella hægri útbúgving.
Eisini skal tann, sum ætlar sær at lesa HD 1. part, hava prógv í støddfrøði á B stig. Til ber eisini at lesa onkra einstaka lærugrein, sum tú kanska hevur brúk fyri í sambandi við arbeiðið.

Undirvíst verður mánakvøld og mikukvøld kl. 15.45 - 19.15. Prøvtøka verður í mai/juni ár 2004.
Luttøkugjaldið er kr. 2.000,00 fyri hvørja lestrarhálvu ella 4.000,00 kr. um árið.
Stakgreinalestur hevur onnur gjøld.

Umsóknarblað fæst á skúlanum. Ringið á skúlan 317177 ella send teldupost sg@hsh.fo
Skrivstovan er opin mánadag - fríggjadag millum kl. 8.00 og 16.00. Eru tygum í iva um okkurt við HD 1. parti ber eisini til at ringja til skúlan. Umsóknarfreistin er **10. juni 2002.**
Møguleiki verður eisini at lesa HD 1. part í Suðuroy, avmarkað pláss.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel 317177, Fax 313374

Kunngerð

frá Føroya Lærarafelag

Semja um savnsrøkt varð gjørd millum Føroya Lærarafelag, Mentamálastýrið, Fíggjarmálastýrið og Kommunusamskipan Føroya 14. mai 2002.

Semjan verður løgd út á álitisfólka- og limaráðstevnunar í Samhøll og á heimasíðu Føroya Lærarafelags.

Í hesum sambandi er blokadan móti skrivligu prógdømingini í 9. og 10. flokki tikin aftur.

Við hesum er skipan fingin í lag, so serhølini í teimum kommunum, sum hoyra til Kommunusamskipan Føroya, aftur kunnu virka sum vanligt.

Av tí, at Føroya Kommunufelag ikki er partur í hesi semju, noktar Føroya Lærarafelag framvegis limum sínum at røkja serhølir í skúlunum í teimum kommunum, sum eru limir í Føroya Kommunufelag.

Føroya Lærarafelag

Í BÝIN
– HVØNN HÓSDAG

TILTØK

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Árstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00. Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang,
Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHz Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Kristnastova
Birmavej 36, København S,
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni
Thorsgade 65, 2200
København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Prestur er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyskt møti í Ålborg
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

Vika 20 – 15. mai
Vinnaratøl: **18 - 31 - 32 - 34 - 40 - 45**

Eykatøl: **03 - 44**

6 vinnaratøl:	**1.735.326,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**194.728,- kr.**
5 vinnaratøl:	**5.907,- kr.**
4 vinnaratøl:	**150,- kr.**
3 vinnaratøl:	**45,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

KROSSORÐ



Vinnari:

Sólfrið Hansen
Niðaragøta 28
188 Hoyvík

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: ATLANTSHAV



Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

301

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt